ítróttur

Nr. 241 • hósdagur • 15. desember 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Sensatión í Hoyvík

**Verandi oddaliðið í føroyskum manshondbólti, H71, reyk úr steypakappingini, tá teir á heimavølli hittu næst besta Kyndils-liðið**

COCA COLA-KAPPINGIN
*Jákup Mørk*

Í nógvar mátar hevur júst H71 annars verið mest átøk eini marru hjá besta Kyndilsliðnum. Hóast Kyndil í flestu førum hevur havt eitt á pappírinum sterkari lið hesi seinnu árini, so hevur tað gingið illa at fáa bilbukt við treisku hoyvíkingarnar, sum ferð eftir ferð hava argað grønu grannarnar.



*Við 14 málum var Rókur Akrálíð stóri skarprættarin, tá 2. lið hjá Kyndli í gjár sendi oddaliðið í føroyskum manshondbólti úr steypakappingini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Málverjin tók 7 brotskøst

Eitt hugskot í so máta mundu venjararnir hjá Kyndli kanska fáa mikukvøldið. Tí hjá næst besta Kyndilsliðnum lá ræði fyri, tá teir tókust við H71. Eitt H71, sum enntá er oddalið í landskappingini.

Gaman í var talan um eitt væl mannað Kyndils-lið. Millum spælararnar á liðnum vóru eitt nú Hans Arni Thomsen, Rókur Akralíð, Hjalti M. Jacobsen og Zeljko Hornijak. Men at hesir skuldu taka oddaliðið, H71, var helst eingin, sum hevði roknað við. Men longu fyri steðgin vóru greið tekin um, at hetta ikki skuldi verða lætt hjá hoyvíkingunum. Kyndil hevði fyri tað nógva munin, og í seinna hálvleiki kom av álvara gongd á. Eisini hóast teir grønu misnýttu ikki færri enn 7 brotskøst. Endin varð, at Kyndil vann ein tryggan 30-23 sigur, sum ivaleyst hevur sent dyggar skjálvtar gjøgnum sjálvsálitið hjá teimum hvítu. Og at teir so eisini fingu tvey reyð kort, mundi ikki gera støðuna betri. Hesi merkja nevnliga, at Jakob Jónsson og Tróndur Vatnhamar báðir eru leikbannaðir til fyrsta dystin í endaspælinum. Ein dystur, sum er á heimavølli móti - ja, sjálvandi - Kyndli.

Í hinum trimum dystunum hjá monnum gekk meira soleiðis eftir forskriftini. Kyndil (altso fyrstaliðið), VÍF og StÍF vunnu sínar dystir, og soleiðis eru tey eisini klár til hálvfinaludyst.

### Kyndil í finaluni

Við sigrunum hjá báðum teimum bestu liðunum, er longu greitt, at Kyndil hevur umboð í finaluni, tá hendan verður spæld. Siðvenjan á økinum er, at hevur eitt felag tvey lið í hálvfinalunum, so skulu hesi bæði spæla móti hvørjum øðrum.

Tí er longu greitt, at VÍF og StÍF - aftur í ár - spæla hálvfinalu, meðan Kyndil og Kyndil eiga hina hálvfinaluna.

**Úrslitini í fjórðingsfinalunum í Coca-Cola kappingini vóru hesi:**

H71-Kyndil II 23-30 (11-14)
Kyndil I-StÍF II 36-23 (15-12)
VÍF-Neistin 35-25 (18-10)
StÍF I-KÍF 20-14 (9-11)

# StÍF basti Kyndli

**Hesa ferð eydnaðist hjá StÍF, sum sunnudagin akkurát ikki knógvaði Kyndli. Og Neistin vann tryggan sigur á Søljuni**

COCA COLA-KAPPINGIN
*Jákup Mørk*

Tvær av fjórðingsfinalunum hjá kvinnunum vórðu spældar í gjár og fyrradagin.

Fyrradagin tók Neistin móti Søljuni, og her gjørdist talan um tryggan heimasigur. 38-19 vann Neistin, sum í hálvleikinum var á odda 14-10.

Í gjár var tó øðrvísi spenningur, tá Kyndil tók ímóti StÍF. Somu lið spældu sunnudagin javnleik, og aftur hesa ferð leikaði javnt á. Kyndil var tó odda stóran part av dystinum, og bara fimm minuttir fyri leiklok stóð 17-14 á talvuni. Seinastu løtuna bragdaði tó av álvara hjá StÍF. Tær vunnu seg upp á 18-17, og tó at Kyndil javnaði, so fekk StÍF seinasta orðið, tá Rebekka Justinussen skoraði til endaliga úrslitið.

### Úrslitini

Neistin-Søljan 38-19 (14-10)
Kyndil-StÍF 18-19 (11-8)

# Ítróttar-fjepparar kappast á Cippo




**Cippo fer nú undir veruliga kapping í sonevndum Barsports. Endaligi vinnarin fær eina ferð til Champions League finaluna**

KAPPING
*Jákup Mørk*

Pool, airhockey og borðfótbóltur eru allar tríggjar ítróttargreinar, sum ítróttarfjepparum plagar at takast við, tá kappast skal innandura.

Í londunum kring okkum hevur í fleiri ár verið gjørt heilt nógv við slíkar kappingar, og nú verður so eisini skipað fyri slíkari kapping í Havn.

Tað er ítróttarcaféin, Cippo, sum skipar fyri kappingini. Kappast verður hvørt hóskvøld, og fara vinnararnir hvørt kvøldið víðari til endaligur finaluna. Og tað er altso í hesari, at til ber at vinna ferð til Champions League finaluna.

Hartil ber eisini til at vinna gávur frá Føroya Bjór, Heineken og Sports Master.

# Danir kunnu aftur enda í Svøríki

Gøteborg, sum legði gras til EM-finaluna í 1992, vil nú aftur hava EM-endaspælið. Møguliga í samstarvið við Keypmannahavn

Kommunustýrið í svenska stórbýnum tók í dag avgerð um, at teir vilja arbeiða fyri at gerast vertur fyri EM-endaspælinum í 2016.

Borgarstjórin, Jan Hallberg, sigur við svenska Aftonbladet, at hetta helst verður í samstarvi við aðrar býir. Eitt nú Malmø, Stockholm ella kanska Keypmannahavn.

Svenska fótbóltssambandið fer nú at kanna, hvørt Gøteborg lýkur krøvini fyri slíkari umsókn.